Kunngerðablaðið A

2017 Givið út 14. desember 2017

Nr. 156 12. desember 2017

**Kunngerð um broyting í kunngerð um Mentanargrunn Landsins**
(Listafólkalønir)

**§ 1**

Í kunngerð nr. 109 frá 21. september 2000 um Mentanargrunn Landsins verða gjørdar hesar broytingar:

**1.** § 1, stk. 1 og 2 verða orðað soleiðis:
"Mentanargrunnur Landsins veitir stuðul til tey í § 1 í løgtingslógini nevndu endamál, undir hesum starvslønir, listafólkalønir, íverksetanarstuðul, styttri skeið hjá listafólkum og stuðul til ymiskar verkætlanir.
*Stk. 2.* Mentanargrunnur Landsins kann harumframt eftir umsókn stuðla bókaútgávur og tónleikaútgávur upp til 30% av útgávukostnaðinum."

**2.** Í § 2, stk. 1 verður "í undirvísingar- og mentamálum" strikað.

**3.** Í § 4, stk. 2 verður "løgtingslóg um Mentanargrunn Landsins" broytt til: "løgtingslógini".

**4.** § 4, stk. 3 verður orðað soleiðis:
"*Stk. 3.* Starvslønir kunnu verða latnar soleiðis:
1) Ein starvsløn galdandi í 3 ár.
2) Tvær starvslønir galdandi í 1 ár.
3) Starvslønir galdandi í 1 til 6 mánaðir."

**5.** Aftan á § 4 verður sett:

"*Listafólkaløn*

**§ 4 a.** Endamálið við listafólkalønunum er at bøta um korini hjá yrkislistafólkum, sum í játtanarskeiðnum burturav arbeiða við list. Útgangsstøðið er, at listafólkini skulu arbeiða í minsta lagi í 3 ár. Møguleiki er fyri, at hesar listafólkalønir kunnu latast tríggjar ferðir, t.e. at eitt setanarskeið varir í mesta lagi 9 ár.
*Stk. 2.* Listafólkalønir verða veittar umsøkjara við støði í verkevni ella verkætlan, sum lýkur krøvini í § 1 í løgtingslógini og eftir nevndarinnar meting av listaligum ella fakligum dygdareyðkennum. Tó kunnu listafólkalønir verða veittar við støði í listaligari fakligheit ella royndum hjá umsøkjara.
*Stk. 3.* Nevndin fyri Mentanargrunn Landsins setir faknevndir, sum viðgera umsóknirnar um listafólkalønir og gera tilmæli til nevndina fyri Mentanargrunn Landsins. Faknevndirnar skulu verða mannaðar við útbúnum fakfólkum innan ávísu listaøkini.
*Stk. 4.* Yrkislistafólk eru tey, sum hava lokið viðurkenda yrkisfakliga útbúgving ella hava samsvarandi royndir innan listaliga økið.
*Stk. 5.* Listafólkalønin um mánaðin svarar í upphædd til læraraløn á fólkaskúlans lønarstigi 21, stig 1."

**6.** § 5, stk. 3 verður orðað soleiðis:
"*Stk. 3.* Íverksetanarstuðul er á kr. 75.000,- árliga. Íverksetanarstuðulin kann nýtast til tilfar, leigu av atelier, námsferðir, livikostnaði o.til."

**7.** Í § 6, stk. 2 verður "løgtingslóg um Mentanargrunn Landsins" broytt til: "løgtingslógini".

**8.** § 7, stk. 1 verður orðað soleiðis:
"Stuðulsmóttakari skal lata nevndini fyri Mentanargrunnin roknskap og frágreiðing, eftir at tiltakið er av, tó í seinasta lagi 1. apríl árið eftir játtanarárið. Henda áseting er eisini treyt fyri nýggjari tilsøgn."

9. Í § 7, stk. 3 verður “Starvslønarmóttakarin skal” broytt til: “Tey, sum fáa starvsløn ella listafólkaløn skulu”.

10. Í § 7, stk. 4 verður “starvslønarmóttakari” broytt til: “tann, sum fær starvsløn ella listafólkaløn”.

**§ 2**

Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Mentamálaráðið, 12. desember 2017

**Rigmor Dam (sign.)**
landsstýrismaður

/ Poul Geert Hansen (sign.)